# ítróttur

Nr. 5 • Leygardagur • 8. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur:**
**Sunnudagin 9. januar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kl. 14.30 | VÍF-Sóljan | Sunset-kappingin | Vestmanna |
| Kl. 14.30 | Kyndil-Neistin | Sunset-kappingin | Hálsi |
| Kl. 15.00 | Tjaldur-Stjørnan | Sunset-kappingin | Runavík |
| Kl. 15.00 | VB-StÍF | Sunset-kappingin | Vági |
| Kl. 16.00 | KÍF-Neistin | Atlantic Airways-kappingin | Hoyvík |
| Kl. 16.00 | VÍF-H71 | Atlantic Airways-kappingin | Vestmanna |
| Kl. 16.00 | StÍF-Kyndil | Atlantic Airways-kappingin | Skála |

# So byrjar endaspælið

**Um vikuskiftið verður lagt til brots í endaspælinum í Atlantic Airways-kappingini. Nú stigini eru koyrd í helvt, stendur á jøvnum millum Kyndil og VÍF**


HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Sunnudagin skulu øll liðini í Atlantic Airways-kappingini aftur í dyst eftir ein steðg upp á nakrar vikur um høgtíðina. Teir tríggir dystirnir eru samstundis teir fyrstu í endaspælinum í ár, og spenningurin í kappingini er stórur.



*Vestmenningar hava vanliga gott tak á H71, tá ið hoyvíkingar vitja VÍF í Vestmanna*

*savnsmynd*

### Kyndil ella VÍF

Um vit skulu meta út frá grundspælinum, so bendir alt á, at tað verða teir báðir risarnir í føroyskum manshondbólti, Kyndil og VÍF, sum aftur í ár fara at berjast um gullkrónurnar, tí hóast munurin millum hesi bæði liðini og so hini liðini á stigatalvuni ikki er so stórur, so tykist tað sum um, at tey leikliga eru eitt vet betur enn mótstøðuliðini.

Kyndil, sum hevur ligið á odda at kalla alt kappingarárið higartil, skal sunnudagin inn á Skála at spæla móti strandingum, og tað kann gerast ein spennandi dystur. Strandingar høvdu eina ógvuliga trilvandi byrjan upp á kappingarárið, men í seinastu dystunum í grundspælinum tóktust verða við at koma fyri seg. Um tað er nóg mikið til, at teir kunnu gera ein vørr móti kyndilsmonnum, vil tíðin so vísa.

Í Vestmanna fær hitt oddaliðið VÍF vitjan av hoyvíkingum. H71 tók øll á bóli, tá ið teir í byrjanini av kappingarárinum løgu heilt frammi í oddinum, men so reyk liðið í ein aldudal og tapti fleiri dystir á rað. Vestmenningar hava hinvegin verið rættuliga støðugir, men hava tó snávað í báðum dystunum móti arvafíggindunum og nærmastu kappingarneytunum úr Kyndli. Í seinasta dystinum í grundspælinum hittust júst VÍF og H71 í Hoyvíkshøllini, og tann dysturin endaði við javnleiki. Tað var um reppið, at hoyvíkingar tá fóru við sigrinum, men vestmenningurin hjá H71, Johnny Durhuus, brendi eitt brotskast, tá ið tíðin var farin.

### Botnuppgerð í Hoyvík

Seinasti dysturin hetta umfarið verður í Hoyvíkshøllini, har kollfirðingar fáa vitjan av Neistanum. Hetta eru tvey av aftaru liðunum í fremstu mansdeildini, sum ikki av álvara hava fingið glið á spælið hjá sær í ár. Í mun til hvat varð væntandi, so kann ikki sigast annað, enn at árið í ár hevur verið eitt satt vónbrot hjá neistamonnum, og tað førdi eisini við sær, at leikandi venjarin, Damir Oros, gavst sum venjari. Nú er hann bara spælari, og tað tóktist hjálpa eitt sindur upp á støðuna, og so verður spennandi at síggja, hvønn týdning tað kemur at hava, tá ið Oros skal dystast við gomlu liðfelagarnar úr Kollafirði sunnudagin.

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
**MENN**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 308 | 238 | 70 | 8 |
| 2 VÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 295 | 259 | 36 | 8 |
| 3 H71 | 0 | 0 - 0 - 0 | 297 | 293 | 4 | 5 |
| 4 KÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 241 | 271 | -30 | 4 |
| 5 StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 267 | 303 | -36 | 3 |
| 6 Neistin | 0 | 0 - 0 - 0 | 268 | 312 | -44 | 3 |

**SUNSET KAPPINGIN**
**KVINNUR**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 10 - 0 - 0 | 267 | 198 | 69 | 20 |
| 2 VB | 10 | 9 - 0 - 1 | 309 | 192 | 117 | 18 |
| 3 Neistin | 11 | 8 - 0 - 3 | 321 | 233 | 88 | 16 |
| 4 Søljan | 11 | 6 - 0 - 5 | 313 | 261 | 52 | 12 |
| 5 VÍF | 11 | 5 - 0 - 6 | 266 | 249 | 17 | 10 |
| 6 StÍF | 10 | 2 - 1 - 7 | 215 | 261 | -46 | 5 |
| 7 Kyndil | 11 | 1 - 1 - 9 | 197 | 312 | -115 | 3 |
| 8 Tjaldur | 10 | 0 - 0 - 10 | 177 | 359 | -182 | 0 |

## Vestmenningar stuðla Reyða Krossi

Vestmanna Ítróttarfelag hevur avgjørt, at inntøkurnar av dystunum í Atlantic Airways og Sunset kappingunum í Vestmanna, sunnudagin 09.01.05, verða latnar Reyða Krossi, í samband við innsavnanina til tey neyðstøddu eftir flóðalduvanlukkuna í Fjareystri.

Vanligt atgongugjald verður kravt til dystirnar, men hava fólk áhuga í at lata meira, eru tey vælkomin til tað.

Stuðulsfelagið hjá VÍF fer undir dystunum, at samskipa innsavnan pening, umframt at dómararnir til dystirnar, Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen, hava játtað, at ásetta dómarasamsøðning teirra eisini skal latast Reyða Krossi.

Á hendan hátt vil VÍF sýna samkenslu við teimu raktu og stuðla eftir førimuni.

# Mest spennandi í Vestmanna

**Fýra dystir eru á skránni í Sunset-kappingini sunnudagin, og á pappírinum sær út til, at størsti spenningurin verður í Vestmanna**


HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Í Vestmanna fær VÍF vitjan av Søljuni, og vágakvinnurnar hava verið óivað mest positiva yvirraskilsi í kvinnukappingini í ár. Tær hava ligið heilt frammi í oddinum, men eru dotnar niður á fjórðaplássið nú beint framman fyri VÍF. Vestmannakvinnnur hava í fleiri ár verið við í toppinum av føroyskum kvinnuhondbólti, men missurin av fleiri lyklaleikarum undan hesum kappingarárinum hevur ført við sær, at tær nú ikki longur teljast millum medaljukandidatarnar.



*Í Sunset-kappingini verður grannauppgerð á Hálsi sunnudagin, tá ið Kyndil og Neistin hittast*

*savnsmynd*

### Lætt hjá teimum fremstu

Tey trý fremstu liðini í Sunset-kappigini, Stjørnan, VB og Neistin hava øll trý á pappírinum lættar uppgávur sunnudagin. Oddaliðið Stjørnan skal til Runavíkar at dystas við avgjørda botnliðið Tjaldur, og tað hevði verið einki minni enn ein sensatión, um tað skuldi eydnast Tjaldrinum at fáa sítt fyrsta stig í hesum kappingarárinum í tí dystinum.

Nærmastu kappingarneytarnir hjá Stjørnuni eru vágskvinnur, og VB fær sunnudagin vitjan av StÍF í Vági. Her er eisini lagt upp til ein stórsigur til heimaliðið, sum serliga á heimavølli ofta renna móstøðuliðini um koll. StÍF hevur tó viðvhvørt gjørt ein vørr móti onkrum av fremru liðunum, men at tær skulu gera nakað við VB í Vági tykist ógvuliga lítið sannlíkt.

Í Havn verður grannauppgerð millum havnarfeløgini bæði, Kyndil og Neistan, og her eru neistakvinnur greiðir favorittar. Neistin liggur í løtuni á einum bronsuplássi, meðan Kyndil er næstaftast, og munurin á hesum báðum liðum hevur verið týðuligur í innanhýsis dystunum fyrr í ár, og tað verður hann óivað eisini sunnudagin.